Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Føroyavinur 50 ár



Frímerkjasavnari fyllir 50 ár sunnudagin 16. mai.

Ein av Føroya donsku vinum, Steen Jack Petersen í Rødby á Lollandi, fyllir 50 ár sunnudagin 16. mai.

Steen ger nógv við at savna føroysk frímerki, og tað hevur hann gjørt, líka síðan hann sum stórur drongur fyrstu ferð vitjaði í Føroyum saman við pápa sínum.

Eitt øki í postsøgu Føroya, sum Steen við serligum áhuga hevur lagt seg eftir, er brævflutningurin til og úr Føroyum undir seinna heimsbardaga og ta fyrstu tíðina aftaná. Posturin kom tá úr Føroyum til Onglands og helt so fram haðani til Svøríkis, áðrenn hann kom fram til Danmarkar og onnur lond.

Í greinum í ymiskum filatelistiskum tíðarritum hevur føðingardagsbarnið gjølliga lýst postflutningin millum Føroyar og umheimin og víst eina ørgrynnu av heimildum um føroyskan brævpost frá árunum 1940-45 við censurstemplum o.s.fr. frá myndugleikunum bæði í Onglandi og Danmark.

Áhugin hjá Steen Jack Petersen fyri føroyskum frímerkjum og føroyskari postsøgu hevur gjørt hann til ein eftirspurdar fyrilestrahaldara í mongum frímerkjaklubbum um øll Norðurlond.

Fyri bara tveimum vikum síðan vann savn hansara við føroyskum frímerkjum og ikki minst postsøguligum brævbjálvum gullmedalju á einari stórari frímerkjaframsýning í Hillerød.

Heimasíðan hjá Steen:
http://www.faroestamps.dk/

# Lisa Bevere á kvinnustevnu í Oslo

## Kvinnustevnan JesusKvinner 2010 verður í Oslo døgunum 28. - 29. mai.

Ein av talarunum á stevnuni verður amerikanska Lisa Bevere, altjóða talari og rithøvundur, sum hevur ein serligan hátt at leggja sín boðskap fram á ein kraftmiklan og humoristiskan hátt. Lisa býr í Colorado Springs saman við manni sínum John Bevere, ið er kendur prædikumaður. Tey hava eisini sítt egna sjónvarpsprogramm, The Messenger, sum verður víst í meira enn 200 londum kring um í heiminum.

Felagsskapurin Jesus-Kvinner bleiv stovnaður í 2003 av norsku Anne Christiansen. Saman við manninum Stephan Christiansen hevur hon verið við til at stovna felagsskapirnar Jesus Revolution og Jesus Church Oslo. Anne Christiansen verður ein av talarunum á stevnuni.

Høvið verður eisini hjá føroyskum kvinnum at luttaka á stevnuni, siga Halldóra Krett Johansen og Anna av Rana, sum, um nóg nógv tekna seg, fyrireika eina flogferð beinleiðis úr Vágum til Gardemoen í Norra fríggjadagin 28. mai og heim aftur sunnudagin 30. mai. Áhuga kunnu venda sær til fyrireikararnar á tel. 317698 ella 562332.



*Lisa Bevere, altjóða talari og rithøvundur*

## Føðingar

15. juli 2009 fingu Petrina Maria Berg og Carl á Lag, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4100 gr.

28. mars fingu Dania Eyðunsson og Petur G. Joensen, Vági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3750 gr.

6. apríl fingu Paulina Maria Norðberg og Heri Norðberg, Hvalba, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3550 gr.

20. apríl fingu Jastrid H. Sivertsen og Absalon Ø. Sivertsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3710 gr.

22. apríl fingu Majken Josveinsdóttir og Dánjal Sørensen, Hov, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3510 gr.

30. apríl fingu Karina og Mikkjal Pauli Lamhauge, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3250 gr.

1. mai fingu Esther og Jón Hardy Viðbjørg, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2070 gr.

3. mai Sylvia Katrina Thomassen og Árni Hoydal Thomassen, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3985 gr.

7. mai fingu Marita Gregersen Hansen og Djóni Nolsøe Joensen eina dóttur á Hvidovre hospitali. Hon vigaði 3738 gr og var 54 cm long,

7. mai fingu Salve og Niels Nattestad, Miðvági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

9. mai fingu Katrin Rubek Nielsen og Mortan A. Carlsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3245 gr.

9. mai fingu Mathilda Pætursdóttir og Fróði F. Nielsen, Eiði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3650 gr.

9. mai fingu Joan Laursen og Regin Olsen, Sandavági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4270 gr.

10. mai fingu Tóra A. Gudmundson og Høgni M. Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2700 gr.

11. mai fingu Kirstin L. Clemmensen og Sigtór Lützen, Syðradali, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3950 gr.

11. mai fingu Anja Hansen og Ragnar Joensen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3120 gr.

11. mai fingu Ann Mortensen og Sigtór Andreassen, Norðskála, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3320 gr.

13. mai fingu Janet Sharon og Eivin Gleðisheygg, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3200 gr.